Fleyr-Fram 3-2 (25-22, 19-25, 25-19, 12-25, 15-11):

# Fleyr veksur vindin

**Fleyr hevur í seinastuni verið meir sum ein hvirla. Leygardagin vunnu teir fyri fjórðu ferð á rað eftir ein fínan dyst móti Fram, sum vann flest bóltar, men sum tapti 2-3 í settum**

FLOGBÓLTUR
*Emil Lisberg Jacobsen*

Grundspælið í meistaradeildini hjá monnum endaði leygardagin við einum fínum dysti millum havnarliðini bæði Fleyr og Fram. Tá avtornaði hevði Fleyr vunnið 3-2, og tað var sjálvt um Fram hevði vunnið flest bóltar í dystinum - 102 móti teimum 96 hjá Fleyr. Men tað kunnu teir í Fram ikki brúka til so nógv annað enn, at tað var ein sera javnur dystur, sum kundi farið báðar vegir.

Fyri kappingina gjørdi tað einki, at Fleyr vann. Nú stigini verða koyrd í helvt, eru Fram og SÍ fremst við seks stigum, meðan Fleyr er beint í hølunum á teimum við fimm. Við øðrum orðum er lagt upp til eina sera spennandi kapping hjá monnunum, har trý lið síggja út til at hava nøkulunda eins, góðar møguleikar at enda við gullinum.

## Skiftust um settini

Dysturin í Gundadalshøllini leygardagin var sum sagt spennandi, men bæði liðini kunnu ivaleyst siga, at tey hava leikt betri dystir enn hendan.

Tað var sum um menn vóru eitt sindur spentari enn vanligt, og tað stóð eisini hampuliga nógv uppá spæl. Umframt tvey týdningarmikil stig var hetta jú eisini ein lokaluppgerð, og í slíkum verður tað ikki altíð pláss fyri tí heilt góða spælinum.

Fyrsta sett bleiv tað javnasta í dystinum. Tað vann Fleyr 25-22, áðrenn liðini síðani vunnu hvør sítt sett 25-19.

Frá byrjan í fjórða setti hevði Fram greiða yvirvág, og teir vunnu eisini so trygt sum 25-12. Sum tíðin gekk, sóu teir í Fleyr, at hetta settið var tapt, og tað var sum um teir bara vildu hava tað av vegnum, so tað fimta og avgerandi settið kundi byrja.

Her kom Fleyr betur frá byrjan og teir hildu seg frammanfyri allatíðina. Við støðuni 14-8 megnaði Fram at bjarga støðuni tríggjar ferðir, men so bar ikki til meir, og Fleyr vann 15-11.

## Fýra sigrar á rað

Tað skilst á lagnum, at teir í Fram ikki hava verið so raskir at venja í seinastuni, og um vit skulu leita eftir orsøkum til tapið leygardagin, man hetta vera ein av teimum. Eftir hvat skilst var støðan nøkulunda tann sama í fjør, tá tað gekk væl í byrjanini, men tá so menn fóru at slaka undir venjing, dragnaði liðið so líðandi.

Hjá Fleyr spældi hevarin Klæmint Isaksen betri enn mótparturin hjá honum hinumegin netið, Pascu Øster, serliga í byrjanini. Rúni Weihe er altíð ein hóttan hjá Fram, men tá hevarin ikki spælir so væl, verður tað skjótt trupult í álopspartinum.

Sigurin hjá Fleyr skal kanska eisini síggjast í ljósinum av, at teir hava riðið á einum aldukambi í seinastuni. Fýra dystir á rað eru vunnir, harav tríggir á útivølli og tveir av teimum móti liðum, sum lógu og enn liggja omanfyri teir á stigatalvuni. Tað kann vera ómetaliga ringt at spæla móti einum liði, sum hevur viðrák, og tað hevur Fleyr havt, síðani venjarin varð skiftur út.




*Fleyr vann fjórða sigurin á rað móti Fram, og hava nú veruliga fingið samband við oddaliðini*

Mjølnir-SÍ 1-3

# SÍ fleiri streingir enn Mjølnir

**Mjølnir vann fyrsta sett móti SÍ, men yvir dystin sum heild var SÍ klárt betra liðið og vann uppiborið**

FLOGBÓLTUR
*Emil Lisberg Jacobsen*

Hevði Mjølnir vunnið móti SÍ, høvdu klaksvíkingar verið við í avgjørda oddastríðnum, tá seinna helvt av kappingini byrjar komandi vikuskifti. Men 3-1 sigurin hjá SÍ ger, at Mjølnir er sett eitt sindur til viks í kappingini um fremstu plássini, skilt á tann hátt at teir ikki kunnu teljast millum oddaliðini. Men harvið er ikki sagt, at Mjølnir er úti úr kappingini, tí tað eru teir langt frá.

Tað er SÍ heldur ikki, og sigurin í Klaksvík ger, at teir kunnu byrja endaspælið við seks stigum eins og Fram.

Tað var annars Mjølnir, sum tók fyrsta stikkið við at vinna fyrsta sett 26-24. Men ein afturvendandi trupulleiki hjá Mjølni hevur verið, at liðið ikki tolir mótgongd serliga væl. Fer tað at ganga illa eina løtu, hava menn lyndi til at fara niður við høvdinum og brúka ov langa tíð til at koma fyri seg aftur.

Hetta hendi eisini í næsta setti, tá SÍ fekk betri skil á sítt álopsspæl og vann settið rímiliga trygt.



*Við tapinum fyri SÍ er Mjølnir sett eitt sindur til viks í oddastríðnum, men sørvingar vóru teir betru, og høvdu sigurin uppibornan*
*Mynd: SáH*

Í triðja setti var tað aftur Mjølnir, sum kom betur frá byrjan og legði seg á odda 6-1. Hesa løtuna var tað serliga blokkurin hjá Mjølni, sum steðgaði atsóknunum hjá sørvingum. Mjølnir helt seg eisini frammanfyri ein stóran part av settinum, men so fekk SÍ fótin fyri seg. Tað bleiv tætt, men útiliðið dró longra stráið og legði seg framum í settum.

Sum dysturin leið í Klaksvík, bleiv tað alsamt meira týðiligt, at SÍ hevði fleiri streingir at spæla uppá enn Mjølnir. Klaksvíkingar komu í neyð av jumpservunum hjá SÍ, og serliga Borko Ilic servaði væl. Kanturin hjá Mjølni vann ov lítið, og sørvingar kundu uttan stórvegis hóvasták vinna hetta settið og avgera dystin. Ein týdningarmikil sigur, sum ger, at teir eru á odda saman við Fram, tá endaspælið byrjar næsta leygardag. Tá skal eitt umfar spælast (Fleyr-ÍF og SÍ-Fram), og so kemur jólafriður yvir kappingina, sum ikki fer í gongd aftur fyrr enn 12. januar. Men áðrenn tað verður Mjølnir-kappingin í Klaksvík, har finnast skal útav, hvør skal spæla móti SÍ í steypafinaluni í februar.



Fleyr-TB 0-3 (20-25, 24-26, 10-25):

# TB heldur fast

**Fleyr beit væl frá sær móti favorittunum úr TB, men til síðst bleiv yvirmaktin ov stór. Hóast 3-0 sigurin var TB-venjarin ikki heilt nøgdur við avrikið hjá sínum liði**

FLOGBÓLTUR
*Emil Lisberg Jacobsen*

Tað vísir seg ofta, at jú betri úrslit ein fær, jú størri krøv setir ein sær sjálvum. Hetta er náttúrligt og rættiliga sunt, tí tá tað gongur væl og ein er nøgdur, sjálvt um avrikini kanska ikki eru so góð, so kann tað lættliga enda við, at menningin steðgar, og onkuntíð fer tað enntá so langt, at tað gongur hinvegin aftur. Við øðrum orðum loysir tað seg sjáldan at »hvíla á lavrberjunum«.

Hjá TB hava úrslitini higartil verið framúr, men tað sær ikki út til, at tey á Tvøroyri fella í gomlu grøvina og halda alt standa væl til. Í øllum førum var venjarin Virgar Djurhuus ikki heilt nøgdur, sjálvt um TB leygardagin vann 3-0 móti Fleyr í Havn.

- Úrslitið kunnu vit sjálvandi ikki seta ein fingur á, men satt at siga, so spældu vit illa, serliga í øðrum setti. Leikararnir tordu ikki veruliga at taka ábyrgd, tá tað stóð á, og onkur bóltur slapp at detta niður í gólvið millum fleiri leikarar, sum ikki fóru eftir honum. Tað er nakað, sum hendir av og á, og vit kunnu ikki gera so nógv við tað, men móti einum sterkari liði enn Fleyr hevði tað kostað, sigur ein bersøgin venjari.

TB vann settini 25-20, 26-24 og 25-10. Serliga annað sett kundi farið báðar vegir, meðan tað í triðja ongantíð var nakar ivi.

Tær í Fleyr høvdu neyvan gjørt sær tær stóru vónirnar um at vinna á TB, sjálvt um tú í prinsippinum altíð skal fara út á vøllin fyri at vinna. Liðini hava alt árið ligið í hvør sínum enda av kappingini, og hesaferð hendi heldur einki óvæntað.



*Kemur Gudrid Nolsøe afturat hjá oddaliðnum, er einki at ivast í, at liðið verður stórfavorittur at vinna gullmerkini*

## Gudrid Nolsøe møguliga heim aftur

Virgar Djurhuus sigur annars, at tey í TB sum vera man eru sera væl nøgd við gongdina higartil.

- Vit byrjaðu við at vinna Fleyr-kappingina, og longu tá haldi eg, at tað bar til at síggja gongdina. Í so máta eru vit ikki so bilsin av, at tað hevur gingið so væl hjá okkum, sigur hann.

Miðskeiðis í grundspælinum hendi so tað, at útlendski venjarin hjá TB fór av landinum aftur og tók ein leikara við sær, men tað er merkisvert, hvussu lítið hetta hevur ávirkað avrikini á vøllinum. Í summum førum er tað enntá blivið betri, eftir at italski venjarin og rumenski leikarin fóru avstað.

Virgar Djurhuus heldur, at um TB-liðið kann halda dagliga støði í endaspælinum eisini, so fer gullið til Suðuroyar hesaferð, líkamikið hvat hini liðini finna uppá.

TB fær ikki nýggjan venjara hetta kappingarárið. Hinvegin er onkur nýggjur leikari møguliga á veg, men »nýggjur« er kanska ov nógv sagt. Talan er um Gudrid Nolsøe, sum seinastu árini hevur spælt í Danmark, men sum møguliga kemur heim til nakrar dystir seinni í kappingini. Hon var við til at vinna oyggjaleikagull bæði í ár og á Gotlandi fyri tveimum árum síðani og fer uttan iva at styrkja TB-liðið enn meira.

## Flogbóltsstøður

### Meistaradeild, kvinnur

| | | d | v | - | t | v sett | v sett | +/- sett | stig |
|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|
| 1 | TB | 8 | 7 | - | 1 | 22 | 6 | 16 | 14 |
| 2 | Mjølnir | 8 | 5 | - | 3 | 18 | 14 | 4 | 10 |
| 3 | Dráttur | 8 | 4 | - | 4 | 16 | 16 | 0 | 8 |
| 4 | ÍF | 7 | 2 | - | 5 | 13 | 17 | -4 | 4 |
| 5 | Fleyr | 7 | 1 | - | 6 | 4 | 20 | -16 | 2 |

### Meistaradeild, menn

| | | d | v | - | t | v sett | v sett | +/- sett | stig |
|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|
| 1 | SÍ | 8 | 6 | - | 2 | 20 | 10 | 10 | 12 |
| 2 | Fram | 8 | 6 | - | 2 | 21 | 13 | 8 | 12 |
| 3 | Fleyr | 8 | 5 | - | 3 | 18 | 15 | 3 | 10 |
| 4 | Mjølnir | 8 | 3 | - | 5 | 15 | 18 | -3 | 6 |
| 5 | ÍF | 8 | 0 | - | 8 | 6 | 24 | -18 | 0 |

Mjølnir-Dráttur 3-1 (25-19, 25-14, 14-25, 25-14):

# Mjølnir heldur kósina

**Mjølnirkvinnurnar kunnu framvegis avgera sína egnu lagnu eftir sigurin móti Drátti leygardagin**

FLOGBÓLTUR
*Emil Lisberg Jacobsen*

Kvinnurnar hjá Mjølni vunnu sín fimta sigur á rað, tá Dráttur vitjaði í Klaksvík leygardagin, og tí er trýstið á TB tað sama sum áðrenn hetta vikuskiftið.

Endurreisnin hjá Mjølnir er merkisverd, tí hesir fimm sigrarnir koma eftir tríggjar ósigrar á rað. Fyrsti sigurin kom í teirra fjórða dysti móti Fleyr í Havn, men veruliga vendin hjá Mjølni kom í fimta dystinum, tá tær vunnu móti TB á útivølli. Síðani tá hava tær bara hugt annan vegin, og tað er uppeftir. Tá endaspælið byrjar, eru bara tvey stig á muni, og tað merkir, at Mjølnirkvinnurnar sjálvar kunnu avgera sína lagnu.

Tað skuldu fýra sett til leygardagin, og tað er eitt sindur merkisvert, at einki av settunum var serliga javnt. Tað fyrsta var tað tættasta, tí tað endaði 25-19 til Mjølnir. Men síðani endaðu trý tey næstu øll 25-14. Mjølnir vann tað næsta, men so svaraði Dráttur aftur, áðrenn Mjølnir avgjørdi dystin í fjórða setti.

Dráttur fær næsta vikuskifti vitjan av TB, og tað er í endaspælinum, so nú ber til at siga, at ein sigur telur dupult so nógv sum hann hevur gjørt higartil. Mjølnir hevur frívikuskifti næstu ferð, og við øðrum orðum hava tær longu fingið jólafrí. Tær kunnu tí í friði og náðum fyrireika seg til Mjølnirkappingina, har tær uttan iva vera sera uppsettar uppá at vinna sær pláss í steypafinaluni. Steypafinalan hevur verið spæld síðstu tvey árini, og báðu ferðirnar hevur Mjølnir vunnið, so traditiónirnar eru longu har.

*Klaksvíksvinnurnar hava veruliga funnið stevið aftur, og tær kunnu nú sjálvar gera av, hvussu verður við vónunum um at vinna sær gullmerkini aftur*
*Mynd: SáH*

